**LANDSROYND 6. FLOKKUR**
**MARS 2010**
Føroyskt, lesa og skilja tekst

# FØROYSKT

**45 minuttir**



*Skulin.fo - myndasavn. Skúlin við Ósánna. Myndatakari Árni Jacobsen.*

| | |
|---|---|
| Navn: | Flokkur: |
| Skúli: | Lærari: |

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið. Byrjað verður við fyrstu uppgávu á síðu 2, og síðani verða uppgávurnar loystar í teirri raðfylgju, tær koma. Tú kanst skriva við blýanti.

**Til næmingin**

Les søgurnar og svara spurningunum

Ólavur er 13 ára gamal og gongur í 6. flokki í einum skúla í Havn. Hann er næstelstur í sínum flokki, bara Jóhanna er eldri. Hon fyllir 15. januar og Ólavur 28. februar.
Tað eru tveir 6. flokkar í skúlanum, a og b. Ólavur gongur í a-flokkinum. Í flokkinum eru 22 næmingar, 12 gentur og 10 dreingir. Flokslærarin eitur Unn. Hon er rættiliga ung og er fyri kortum vorðin liðug sum lærari. Unn hevur flokkin í føroyskum og enskum. Flokkurin hjá Ólavi hevur fleiri aðrar lærarar eisini.
Í b-flokkinum gongur besti vinmaðurin hjá Ólavi, Høgni. Høgni og Ólavur eru grannar, og teir hava fylgst líka síðan, Ólavur flutti til Havnar at búgva fyri trimum árum síðani. Í flokkinum hjá Høgna eru 24 næmingar, 11 gentur og 13 dreingir. Næmingarnir í báðum flokkum kenna hvønn annan væl og arbeiða ofta saman, tá ið evnisarbeiði ella verkætlanir eru á skránni. Tey hava eisini onkuntíð verið útferðir saman.

**Set x við rætta svarið**

Hvussu gamal er Ólavur?

13 ár ___________

11 ár ___________

12 ár ___________

Nær hevur Ólavur føðingardag?

15. januar ____________

28. februar ____________

18. mars ____________

Jóhanna er eldri enn Ólavur.
Hvussu nógv?

63 dagar _________

20 dagar _________

44 dagar _________

Hvussu nógvir næmingar ganga í 6. flokki í skúlanum, har Ólavur gongur?

22 næmingar ___________

46 næmingar ___________

24 næmingar ___________

Hvussu nógvar gentur ganga í 6. flokki í skúlanum, har Ólavur gongur?

23 gentur ________________

22 gentur ________________

24 gentur ________________

Hvussu nógvir dreingir ganga í 6. flokki í skúlanum, har Ólavur gongur?

24 dreingir ________________

20 dreingir ________________

23 dreingir ________________

Ólavi dámar væl at ganga í skúla, og serliga væl dámar honum at hava tónleik. Hann dugir væl at syngja og spælir eisini fleiri ljóðføri. Hann byrjaði at spæla gittar, tá ið hann var 5 ára gamal, og tá ið hann var 7 ár, fór hann at læra seg at spæla klaver. Harafturat spælir hann trompet og violin. Hann hevur gingið í musikkskúlanum øll árini, hann hevur búð í Havn, og hann hevur eisini verið til onkra tónleikakapping í Danmark.
Høgni, vinmaður Ólavs, leggur einki í tónleik. Honum dámar betur at telva og spæla kort. Hann telvar fleiri ferðir um vikuna, og ofta situr hann eisini við telduna og telvar.
Hóast Ólavur og Høgni ikki hava heilt somu áhugamál, so eru teir góðir vinmenn kortini. Teir práta væl saman, hjálpa hvørjum øðrum við heimaarbeiði, og báðir spæla fótbólt.

**Set x við rætta svarið**

Hvørji áhugamál hevur Ólavur?

svimjing og tónleik ______________

tónleik og fótbólt ______________

tónleik og hondbólt ______________

Hvørji áhugamál hevur Høgni?

telving og fótbólt ______________

telving og svimjing ______________

tónleik og telving ______________

Hvat av ljóðførunum spælir Ólavur ikki?

klaver ______________

trompet ____________

trummur _____________

Hvat ljóðføri hevur Ólavur spælt longst?

trompet ________________

gittar ________________

violin _________________

Ólavur hevur ikki altíð búð í Føroyum. Hann flutti til Føroya fyri trimum árum síðani. Hann er føddur í Noregi. Mamman er úr Bergen og pápin úr Klaksvík. Tey hittu hvørt annað fyri 23 árum síðani, tá ið mamman var í Føroyum og ferðaðist við flokkinum hjá sær. Tá var hon 15 ára gomul og gekk í 9. flokki. Tey vitjaðu flokkin í Klaksvík, sum pápin gekk í. Pápin flutti til Noregs at ganga í studentaskúla, og tey fóru seinni bæði at læra í Tromsø. Frammanundan búðu tey í Bergen. Tá ið foreldrini hjá Ólavi vóru liðug at læra, fluttu tey til Føroya, tí bæði alla tíðina høvdu ætlað sær at flutt til Føroya at búgva.
Mamma Ólav arbeiðir sum fiskifrøðingur á Havstovuni, og pápin er blaðmaður á Dimmalætting. Ólavur eigur trý systkin. Kristina er elst. Hon er 17 ára gomul og gongur á tekniska skúla í Havn. Hjalti er 16 ár og verður liðugur við 10. flokk í summar, og Sólja er yngst. Hon er 7 ár og gongur í 1. flokki. Ólavur er góður við systkini, serliga við Sólju, tí hon sær upp til hann, sum var hann ein stjørna.
Kristina ætlar at læra okkurt handverk. Henni dámar væl at rokast, og hon er fitt í hondunum. Hon hevur sjálv smíðað sær kamar í kjallaranum. Kristina spælir fótbólt við besta liðnum hjá AB, og hon er sera góð. Ólavur væntar, at hon kemur á landsliðið. Hon er tann einasta í teirra familju, sum íðkar nógvan ítrótt. Hann spælir eisini fótbólt, men tað er bara til stuttleika. Kristina spælir fyri at vinna, og ítrótturin er hennara eitt og alt.
Hjalti hevur stóran áhuga fyri teldum og skutarum. Tá ið hann kemur úr skúlanum, setur hann seg antin við telduna, ella fer hann at fjasast við skutaran. Hann keypti skutaran, tá ið hann fylti 16 ár. Hann hevur í nógv ár samlað sær pengar fyri skutaran, m.a. við at bera bløð út.

**Set x við rætta svarið**

Hvussu gamal var Ólavur, tá hann flutti til Føroya?

7 ár ________________

10 ár _______________

12 ár _______________

Hvussu gomul var Kristina, tá hon flutti til Føroya?

12 ár _________________

13 ár _________________

14 ár _________________

Hvar er Ólavur í systkinaflokkinum?

elstur ________________

næstyngstur ___________

næstelstur ____________

Hvar er Kristina í systkinaflokkinum?

yngst __________________

næstelst ________________

elst ____________________

Hvussu gomul er mamma Ólav?

27 ár ________________

35 ár ________________

38 ár _________________

Hvar í Noregi hevur familjan búð?

í Tromsø og Oslo ____________

í Bergen og Tromsø __________

í Oslo og Tromsø ____________

Hvar arbeiðir mamma Ólav?

á Dimmalætting ____________

á Havstovuni ______________

í Vinnumálaráðnum _________

Hvar arbeiðir pápi Ólav?

á Sosialinum _______________

í Kringvarpinum _______________

á Dimmalætting ____________

Á hvørjum oyggjum í Føroyum hevur pápi Ólav búð?

Streymoy og Vágoy ____________

Borðoy og Streymoy ___________

Eysturoy og Streymoy __________

Hvør í familjuni hevur serligan áhuga fyri ítrótti?

pápin _______________

Kristina _____________

Hjalti _______________

Omma og abbi Ólav búgva í Klaksvík, og Ólavi dámar væl at fara til Klaksvíkar at vitja tey. Onkuntíð fer øll familjan til Klaksvíkar. Tá fara tey við bili, men Ólavur fer eisini ofta einsamallur. Tá fer hann altíð við Bygdaleiðum. Leið 400 koyrir fleiri ferðir um dagin ímillum Havn og Klaksvík, so tað er eingin trupulleiki at sleppa til Klaksvíkar við bussinum.
Ólavur ætlar sær til Klaksvíkar næsta vikuskifti. Tá er ein klassisk konsert í Klaksvík, sum hann so fegin vil hoyra. Kristina hevur tosað um at koma við hesaferð, tí hon ætlar at hyggja eftir KÍ-kvinnunum, sum skulu spæla ímóti onkrum útlendskum liði sama vikuskifti.
Ólavur er liðugur í skúlanum kl. 14.30. Hann ætlar sær at pakka taskuna, áðrenn hann fer frá húsum um morgunin, so hann kann fara beinleiðis úr skúlanum á farstøðina, haðani bussurin koyrir. Tað tekur umleið 10 minuttir at ganga frá skúlanum til farstøðina. Hann ætlar sær at taka fyrsta bussin til Klaksvíkar, tí konsertin byrjar í Klaksvík kl. 18.00, og hann ætlar at fara til ommuna og abban við viðførinum fyrst.
Ólavur fer inn á heimasíðuna hjá Strandferðsluni fyri at kanna eftir, nær bussurin fer.

Her er ferðaætlanin hjá leið 400 Tórshavn – Klaksvík
x: gerandisdagar
6: leygardagur
7: sunnudagur

## 400 Tórshavn - Klaksvík

| Dag | Tórshavn | Kollafj. t. | Oyrarb. | Skálab. | Søldarfj. | Gøtud. | Leirvík | Klaksvík |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| x | 06.15 | 06.35 | 07.00 | 07.15 | 07.20 | 07.30 | 07.35 | 07.45 |
| x | 07.55 | 08.15 | 08.40 | 08.55 | 09.00 | 09.10 | 09.15 | 09.25 |
| x67 1) | 09.20 | 09.40 | 10.05 | 10.20 | 10.25 | 10.35 | 10.40 | 10.50 |
| x7 1) | 10.50 | 11.10 | 11.35 | 11.50 | 11.55 | 12.10 | 12.15 | 12.25 |
| x6 | 12.20 | 12.40 | 13.05 | 13.20 | 13.25 | 13.35 | 13.40 | 13.50 |
| x7 | 13.50 | 14.10 | 14.35 | 14.50 | 14.55 | 15.05 | 15.10 | 15.20 |
| x6 | 15.20 | 15.40 | 16.05 | 16.20 | 16.25 | 16.35 | 16.40 | 16.50 |
| x | 16.20 | 16.40 | 17.05 | 17.20 | 17.25 | 17.35 | 17.40 | 17.50 |
| x67 | 17.30 | 17.50 | 18.15 | 18.30 | 18.35 | 18.45 | 18.50 | 19.00 |
| x 1) | 18.20 | 18.40 | 19.05 | 19.20 | 19.25 | 19.35 | 19.40 | 19.50 |
| x67 | 20.30 | 20.50 | 21.15 | 21.30 | 21.35 | 21.45 | 21.50 | 22.10 |

**Set x við rætta svarið**

Nær fer fyrsti bussur úr Havn, sum Ólavur kann taka fyri at náa alt?

Kl. 15.20 ______________

Kl. 16.20 ______________

Kl. 17.30 ______________

Nær er hesin bussur í Klaksvík?

kl. 17.00 ________________

kl. 16.50 ________________

kl. 18.20 ________________

Hvussu nógv er klokkan, tá ið bussurin er á Oyrarbakka?

kl. 18.00 _______________

kl. 17.05 _______________

kl. 16.05 _______________

Hvussu nógv er klokkan, tá ið bussurin er í Gøtudali?

kl. 16.35 ________________

kl. 17.35 ________________

kl. 18.00 ________________

Hvussu leingi er at koyra úr Havn til Klaksvíkar við bygdaleiðum?

60 minuttir ____________

70 minuttir ____________

90 minuttir ____________

Hvussu leingi er at koyra úr Havn til Skálabotn við bygdaleiðum?

45 minuttir _____________

50 minuttir _____________

60 minuttir ____________

Ólavur skal vera aftur í Havn sunnukvøldið í seinasta lagi kl. 19.00, men hann vil eisini sleppa at vera so leingi í Klaksvík sum møguligt.

Her er ferðaætlanin hjá leið 400 Klaksvík - Tórshavn
x: gerandisdagar
6: leygardagur
7: sunnudagur

## 400 Klaksvík - Tórshavn

| Dag | | Klaksvík | Leirvík | Gøtud. | Søldarfj. | Skálab. | Oyrarb. | Kollafj. t. | Tórshavn |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| x | 1) | 05.55 | 06.05 | 06.10 | 06.20 | 06.25 | 06.40 | 07.05 | 07.35 |
| x | | 06.50 | 07.00 | 07.05 | 07.15 | 07.20 | 07.35 | 07.55 | 08.25 |
| x67 | | 07.40 | 07.50 | 07.55 | 08.05 | 08.10 | 08.25 | 08.45 | 09.10 |
| x6 | 1) | 08.55 | 09.05 | 09.10 | 09.20 | 09.25 | 09.40 | 10.00 | 10.25 |
| x7 | 1) | 11.55 | 12.05 | 12.10 | 12.20 | 12.25 | 12.40 | 13.00 | 13.25 |
| x | | 13.10 | 13.25 2) | 13.50 | 13.55 | 14.00 | 14.15 | 14.35 | 15.00 |
| x 67 | | 13.30 | 13.40 | 13.50 | 13.55 | 14.00 | 14.15 | 14.35 | 15.00 |
| x | 1) | 14.30 | 14.40 | 14.45 | 14.55 | 15.00 | 15.15 | 15.35 | 16.00 |
| x6 | 1) | 15.10 | 15.20 | 15.25 | 15.35 | 15.40 | 15.55 | 16.15 | 16.40 |
| x | | 16.20 | 16.30 | 16.35 | 16.45 | 16.50 | 17.05 | 17.25 | 17.50 |
| x67 | 1) | 18.10 | 18.20 | 18.25 | 18.35 | 18.40 | 18.55 | 19.15 | 19.40 |
| x7 | | 19.35 | 19.45 | 19.50 | 20.00 | 20.05 | 20.20 | 20.40 | 21.05 |

**Set x við rætta svarið**

Ólavur fer við bussinum úr Klaksvík:

kl. 15.10 _______________

kl. 18.10 _______________

kl. 13.30 _______________

Nær er bussurin í Havn?

kl. 16.40 _________________

kl. 15.00 _________________

kl. 17.50 _________________

Í páskafrítíðini, sum verður um góðar tvær vikur, fer Ólavur saman við familjuni at vitja ommuna og abban í Noregi. Tað er langt síðani, at Ólavur hevur sæð tey, og hann gleðir seg at síggja tey aftur.
Tey skulu vera í Bergen í nakrar dagar, men hava eisini bílagt pláss á einum skíðstaði í Noregi í nakrar dagar. Ólavur vónar, at kavi er í fjøllunum, tí honum dámar so stak væl at standa á skíðum.
Foreldrini hava bílagt eina smáttu á internetinum. Tey hava ikki verið á hesum staðnum fyrr, men Ólavur heldur staðið vera stak gott. Hann plagar av og á at fara inn á heimasíðuna at lesa eitt sindur um staðið, sum eitur Hemsedal. Tað fær hann at gleða seg enn meira.

**Á heimasíðuni lesur hann hetta:**

*Hemsedal liggur miðskeiðis í sunnara partinum av Noregi, og vanliga liggur kavi har longu frá miðskeiðis í november til byrjanina av mai.*

*Skíðøkið er rættiliga fjølbroytt og er væl egnað, bæði fyri tey, ið ikki hava roynt at standa á skíðum áður, og fyri tey, ið eru von at standa á skíðum.*
*Børn undir 7 ár fáa ókeypis liftkort, og skipað verður fyri nógvum virksemi fyri barnafamiljur. Til ber eisini at læna hjálmar ókeypis.*
*Fyri teir royndu skíðrennararnar eru rúgvuvís av avbjóðingum á teimum svørtu pistunum ella á worldcup breytini, sum er av Tottenfjalstindinum.*
*Umframt hetta er eisini ein snowboardlund við virksemi allan veturin.*

Ólavur ætlar sær niðan á tindin á Tottenfjallinum. Hann er vísur í, at bæði Kristina og pápin eisini ætla sær tað, tí teimum dámar líka væl at standa á skíðum sum honum. Hjalti tímir heilt vist best snowboardlundina, og Sólja hevur ikki roynt at standa á skíðum, so hon fer helst at halda seg til barnabrekkurnar saman við ommuni og abbanum. Hann veit ikki, hvat mamman fer at velja, men hon er tann av teimum øllum, sum hevur staðið mest á skíðum. Hon er vaksin upp í Noregi, og hevur mest sum hvønn vetur verið skíðferðir í norsku fjøllunum.

**Set x við rætta svarið**

| Nær fer Ólavur til Noregs at ferðast? | Hvør í familjuni hevur staðið mest á skíðum? |
|---|---|
| í jólafrítíðini ______________ | pápin ___________________ |
| í heystfrítíðini _____________ | Ólavur __________________ |
| í páskafrítíðini _____________ | mamman ________________ |

Hvørjar serligar avbjóðingar eru fyri roynda skíðrennaran?

reyðar pistir ________________

svartar pistir ________________

bláar pistir ________________

Hvat tilboð er fyri børn undir 7 ár?

ókeypis skíðir ________________

ókeypis matur ________________

ókeypis liftkort ________________

Hvussu kallast skíðstaðið, Ólavur fer til?

Hafell ________________

Aurdal ________________

Hemsedal ________________

Hvørjum í familjuni dámar best snowboard?

Kristina ________________

Hjalti ________________

Ólavur ________________

6. flokkarnir í skúlanum, har Ólavur gongur, hava arbeitt við Norðurlondum í Náttúru og tøkni. Tey sluppu at velja okkurt land at arbeiða við, og Ólavur valdi Noreg, bæði tí at hann visti nakað um Noregi frammanundan, men so sanniliga eisini fyri at fáa meira at vita.
Hann og Høgni tóku sær av at skriva eitt sindur um dýr, ið liva í Noregi. Teir lósu bøkur, leitaðu á netinum og funnu myndir av dýrunum.
Allir bólkarnir skrivaðu og settu upp á plakatir, sum vórðu hongdar upp í gongini, so at hinir næmingarnir á skúlanum eisini kundu fáa eitt sindur at vita um evnið.

**Set x við rætta svarið**

Hvørjum arbeiðir flokkurin hjá Ólavi við?

Evropa ________________

Norðurlondum ________________

Afrika ________________

Hvørjum landi arbeiðir Ólavur við?

Danmark ________________

Svøríki ________________

Noregi ________________

Hvørjum arbeiðir Høgni saman við?

Jóhonnu ________________

Ólavi ________________

ongum ________________

Hvørjum evni arbeiðir Ólavur við?

býum ________________

flogkyktum ________________

dýrum ________________

Hetta skrivaðu Ólavur og Høgni:



**Hjørtur**

Hjørturin er vanligur í stórum pørtum av Suðurnoregi. Hann livir í flokkum. Hjørturin klárar seg best á opnum bøi, men livir eisini í skógi og niðan móti fjøllunum. Honum dámar ikki so væl at koma nær menniskjum. Um dagin bindur hann frið, men um náttina fer hann at finna sær okkurt etandi.

Skinnið á krúnhjørtinum er reyðbrúnt um summarið og grábrúnt um veturin. Í apríl-mai missir krúnhjørturin (kalldýrið) hornið, og seinni um summarið veksur nýtt horn útaftur. Hindin (kvenn-dýrið) hevur ikki horn.

Í juni kálvar hindin. Kálvurin reisir seg og fylgir aftan á mammuni fáar tímar seinni.

Hjørturin etur plantur. Um summarið etur hann gras, leyv, lyng og røtur, og um veturin etur hann m.a. lyng og skón.

Hjørtur er 120-150 cm høgur og kann viga upp til 800 kilo. Hann kann gerast 25 ára gamal.

Hjørtur verður veiddur um alt Noreg í tíðarskeiðnum september-november.



**Hara**

Haran livir um alt landið. Hon trívist best á plássum við skógi og bøi. Haran ger mest um seg um náttina. Haran er grábrún um summarið og hvít um veturin, tó er halin hvítur og oyrasnipparnir svartir alt árið. Haran hevur long oyru og hoyrir væl. Hon hevur so long afturbein, at hon noyðist at hoppa, tá ið hon flytir seg.

Haran leggur 2 – 8 ungar ímillum mars og mai mánað. Tá ið ungarnir verða lagdir, hava teir skinn og eygu og duga at hoppa. Longu eina viku aftaná, at teir eru lagdir, fer mamman frá ungunum, og teir mugu klára seg sjálvar.

Haran etur fyri tað mesta gras og grønar plantur. Hon ger ikki bústað til sín og ungarnar, men heldur til undir trøum.

Hara kann verða 60 cm long og viga millum 2,5 og 5 kg. Hara kann blíva 10-15 ára gomul.

Haran verður veidd um alt landið í tíðarskeiðnum september-mars.

*Myndir frá internetinum.*



**Bjørn**

Bjørnin er skógardýr og dámar væl í brattlendi. Flestu bjarnirnar í Noregi halda til í stóru skógunum við markið til Svøríki. Bjørnin er størsta rovdýrið á fastlandinum í Noregi.
Um ársskiftið leggur kvennbjørnin ungarnar í híðnum. Hon fær vanliga 1-2 ungar annaðhvørt ár. Ungarnir eru ikki størri enn rottur, tá teir verða lagdir, og teir eru bæði naknir og blindir. Ungarnir súgva mammuna allan veturin í híðnum, men um várið koma mamman og ungarnir út. Ungarnir fylgja mammuni fyrsta summarið fyri at læra av henni.
Bjørnin etur alt møguligt, men tó mest ber, røtur og aðrar plantur. Tað hendir tó, at hon bæði tekur elg og reinsdýr. Bjørnin rennur sera skjótt, tá hon veiðir, og hon megnar at fylgja fonginum fleiri kilometrar.
Um veturin liggur bjørnin í híð. Híðið kann t.d. vera eitt helli ella ein hola.
Bjørnin er yvir 2 metrar long og vigar um leið 300 kg. Hon kann blíva 12-20 ára gomul.
Bjørnin er friðað í Noregi, tí at hon hevur verið so nógv veidd, at vandi var fyri, at hon fór at verða útruddað í Noregi.



**Reyði revur**

Vanligasta rovdýrið í Noregi er reyði revurin, og hann heldur til um alt landið. Hann trívist tó best í umráðum við bæði skógi og dyrkaðum bøi.
Reyði revurin hevur reyðbrúnt skinn. Hann hevur langan hala og hvítan halasnipp.
Kvennrevurin og kallrevurin halda saman ár eftir ár, og tey taka sær væl av hvølpunum. Reyði revurin leggur 3 - 8 hvølpar í apríl-mai. Teir súgva mammuna í 3-4 vikur, áðrenn teir fáa fasta føði. Um heystið klára flestu hvølparnir seg sjálvar. Tá hava teir lært, hvussu teir skulu veiða sær mat. Um kvøldið fer reyði revurin út at finna sær okkurt til matna. Best dámar honum mýs. Hann etur tó tað, ið fyri er: Ber, rusk, flogkykt, fuglar og harur.
Revurin hoyrir væl og lurtar seg fram til fongin. Hann drepur fongin við framlabbunum.
Reyði revurin svevur í híðnum um dagin. Revurin hevur altíð fleiri útgongdir úr híðnum, tí hevur híðið altíð nógv rúm og nógvar gongir.
Reyði revurin kann vera 85 cm langur og viga millum 5 og 10 kilo. Hann kann blíva 6 ára gamal
Tað er loyvt at veiða reyða revin alt árið í Noregi.

*Myndir frá internetinum.*

**Set x við rætta svarið**

Hvat er vanligasta rovdýrið í Noregi?

bjørnin ________________

reyði revurin ____________

haran __________________

Hvat av hesum dýrunum liggur í híð?

hjørturin ________________

bjørnin __________________

haran ___________________

Hvat av dýrunum livir stytst?

haran __________________

bjørnin ________________

reyði revurin ____________

Hvat av dýrunum livir longst?

hjørturin _______________

bjørnin _________________

haran ___________________

Hvat av hesum dýrunum er lættast?

reyði revurin ____________

haran __________________

bjørnin ________________

Hvat av hesum dýrunum er tyngst?

krúnhjørturin ____________

bjørnin __________________

reyði revurin _____________

Hvat av dýrunum verður ikki veitt longur?

hjørturin __________________

bjørnin ___________________

reyði revurin ______________

Hvar liva flestu bjarnirnar í Noregi?

í Suðurnoregi _____________

í Miðnoregi ______________

við markið til Svøríki ______

**Set S (satt) ella Ó (ósatt á regluna**

Bjørnin leggur 1-2 ungar hvørt ár ________

Reyða revinum dámar serliga væl at eta mýs ________

Hjørturin er vanligur í Suðurnoregi ________

Hindin kálvar í apríl ________

Hjørturin etur plantur ________

Haran hevur long oyru og hoyrir væl ________

Haran er altíð grábrún ________

Bjørnin er vanligasta rovdýrið í Noregi ________

Haran hevur hvítar oyrasnippar alt árið ________

Reyði revurin leggur 3-8 hvølpar í tíðarskeiðnum apríl-mai ________

Hvølparnir súgva mammuna í eitt ár, áðrenn teir fáa fasta føði ________

Hjørturin kann blíva 120-150 cm høgur ________

Tað er ikki loyvt at veiða haru í Noregi ________

Reyði revurin er friðaður í Noregi ________

Krúnhjørtinum dámar væl at vera saman við menniskjum ________

Haran liggur í híð um veturin ________

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705